

## Løgfrøðingur

Tórshavnar kommuna søkir eftir løgfrøðingi til spennandi starv á stjórnarskrivstovuni.

**Starvið**
Sum løgfrøðingur ráðgevur tú borgarstjóra, stjórn og starvsfólki, og tú ert við til at menna mannagongdir og fyrisitingarliga førleikan í kommununi. Í ávísan mun málsviðger tú og samskiftir við borgarar, virkir og myndugleikar, í serligum málum, ið eru latin stjórnarskrivstovuni at avgreiða.

Tórshavnar kommuna bjóðar tær eitt starv í einum spennandi og dynamiskum umhvørvi, við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum, ið geva tær góðar møguleika fyri fakligari og persónligari menning.

**Setanin**
Sum umsøkjari mást tú hava lokið løgfrøðisligt embætisprógv. Vit ynskja, at tú hevur viðkomandi royndir og helst innan almenna fyrisiting. Tú mást duga væl at samskifta og samstarva bæði innan- og uttanhýsis.

Vit seta starvið skjótast til ber og løna sambært sáttmálanum millum BLF og FMR. Vit kunnu bjóða setan sum ráðgevi, um førleikin og royndirnar eru til tess. Vit bjóða eisini skeið og eftirútbúgving.

Vit kunnu greiða tær meira frá starvinum, um tú ringir til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, tlf. 302010. Tú kanst eisini spyrja okkara fráfarandi løgfrøðing Eyðbjørn Larsen.

**Umsókn**
Tiltalar hetta teg, so send eina umsókn saman við viðmælum og prógvum til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn. Umsóknin skal vera okkum í hendi seinasta lagi 30. oktober 2006, kl. 12.00.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

---

Mylnuhúsið

## Søkt verður eftir pedagogi

### at byrja 1. novembur ella skjótast tilber!

Mylnuhúsið er ein samskipaður dagstovnur við vøggustovu, barnagarði, útibarnagørðum og frítíðarheim. Vit taka dagliga ímóti 138 børnum í aldrinum 0-9 ár.

Í tí námsfrøðiliga arbeiðinum taka vit støði í »tí integreraðu bakgrundini« hetta merkir at tað í Mylnuhúsinum er pláss fyri at bæði børn og vaksin kunnu seta síni spor her. Vit eru serliga upptikin av hvat hevur týdning fyri børnini, og leggja vit gerandisdagin til rættis eftir tí. Vit leggja stóran dent á, at varða um øll børnini.

Vit søkja eftir pedagogi til vøggustovuna, 30 tímar um vikuna.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Annie Joensen leiðara 217789.

Umsóknir til starvið, saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. oktober 2006.

**Mylnuhúsið**
Mylnugøta 10 · 700 Klaksvík
mylnuhusid@mylnuhusid.fo

---



## Spælistovan í Margarinfabrikkini

hevur opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00 til 11.30.
Børn, ið onki dagrøktarpláss hava, eru vælkomin í spælistovuna saman við foreldrunum.

**Tórshavnar kommuna**




Sosialurin
www.sosialurin.fo

---



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

---

**Halt frí í hugnaligum umhvørvi**



**Bílegging:**
**Tlf. 471 800 ella 217 142**
**www.tugvurnar.fo**

---

## Stongt

Sjúkrakassin er stongdur vegna feriu frá 25. oktober til 2. desember 2006, báðir dagar íroknaðir.

Í hesum tíðarskeiði verður eingin útgjalding. Tey, ið hava rokningar til endurrindan, verða biðin um at lata tær inn í seinasta lagi 19. oktober 2006. Um neyðugt er at fáa samband við sjúkrakassan í feriuni, er formaðurin at hitta á tlf. 424211.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**